Fylgiskjal 48

Tórshavn: 21. januar 2020
J.Nr.: 20/00008
(at tilskila í svari)
Viðgjørt: ah/-

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin**

Víst verður til teldupost tykkara frá 17. januar 2020, har omanfyri nevnda uppskot verður sent til hoyringar.

Sambært uppskotinum er tíðarfreistin fyri viðgerðini hjá Tvingsilsnevndini ógvuliga stutt. Í flestu førum skal avgerð takast í seinasta lagi 7 dagar eftir, at tilmælið er móttikið. Innan fyri hesa freist skulu málini fyrireikast, nevnd innkallast og avgerð skrivast. Eru málini ikki nóg væl upplýst, kann úrslitið verða, at málini verða send aftur til myndugleikan, um tað ikki lættliga ber til at innheinta manglandi upplýsingarnar. Sjálvt um gingið verður út frá, at málini eru fult upplýst, tá tey verða send Kærustovninum, eru 7 dagar ógvuliga stutt tíð. Minnast skal til, at talan er um tvingsilsmál, álvarslig inntriv og at málini helst ikki eru einføld. Í viðgerðarfreistini er hædd heldur ikki tikin fyri heilidøgum og øðrum frídøgum og tí vil veruliga tíðin at viðgera hesi mál oftast vera enn styttri enn hesir 7 dagarnir.

Sjálvandi er týdningarmikið, at málsviðgerðin ikki dregur út, men tað er eisini týdningarmikið, at málini eru væl fyrireikaði soleiðis, at røttu avgerðirnar verða tiknar. Tað er væl ongin meining í at áseta so stuttar freistir, at tær ikki eru haldbærar. Heitt verður tí á tykkum um at broyta uppskotið soleiðis, at viðgerðarfreistin verður longd til 2 vikur. Vísast kann í hesum sambandi á § 131 í donsku lov om social service (LBK nr 798 af 07/08/2019). Her er freistin sett til 2 vikur frá tilmælið er móttikið.

Tað verður mett at vera ein fyritreyt fyri viðgerðini í Tvingsilsnevndini, at málini eru fult upplýst, tá tey vera send Kærustovninum, óansæð um viðgerðarfreistin verður broytt til 2 vikur. Skal hetta virka, meta vit tað vera týdningarmikið, at Almannamálaráðið, áðrenn lógin fær gildi, ger greiðar vegleiðingar og helst eisini oyðibløð soleiðis, at tryggjað verður, at neyðugar og nøktandi upplýsingar fyriliggja saman við tilmælunum.

At enda verður spurnartekin enn einaferð sett við, at fráboðanir um skrásett inntriv og frágreiðingar sambært § 28 í uppskotinum skulu latast Tvingsilsnevndini. Nevndin hevur sum uppgávu at góðkenna inntriv og virka sum kærumyndugleiki og hevur ikki eftirlit við bútilboðum v.m. og vandi kann tí vera fyri, at hetta ivaleyst skilagóða yvirliti bert gerst ein innsavnan av tølum við hagfrøðiligum endamáli. Um tað hinvegin var ein myndugleiki, sum hevur eftirlit við bútilboðunum v.m., sum hevur hesa uppgávu um hendi, er tað meiri nærliggjandi, at myndugleikin

setir tiltøk í verk at fremja neyðugar batar á økinum. Tá hevði endamálið við at hava slíka fráboðanarskipan komi meiri til sín rætt. Fráboðanin átti tí heldur at verið gjørd til t.d. Almannamálaráðið.

Verður hildið fast við, at fráboðanir skulu latast Tvingsilsnevndini, er eisini neyðugt, at avvarandi myndugleikar fáa vegleiðingar um, hvat og hvussu fráboðast skal. Annars verður uppgávan at savna saman og viðgera slík hagtøl ógvuliga trupul.

Vinarliga

Anja Hovgaard, stjóri

UNDIR HORNABAKKA • POSTSMOGA 45 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 32 05 85 • WWW.FKS.FO • FKS@FKS.FO